VIÐMERKINGAR

# Nú er nokk !

**Tolið er úti, vit hava bíðað og verðið tolin so tað forslær.
Men nú er nokk.**

**Randi í Jógvanstovu**
*Leirvík*

Í vár legði løgmaður uppskotið um anleggslóg fýri tingið, hann gjørdi tað sjálvur, tí vinnumálaráðharrin Bjarni Djurholm vildi ikki. Sambart Bjarna Djurholm var uppskotið ikki fulfíggjað, tað var als ikki klárt at leggja fyri tingið. Men valið stóð fyri durunum, nógv stóð á, hjá summum, og ein undirsjóvartunnil er vorið sum valagn. Og tað riggaði.

Annlegslógin var samtykt, og hon snýr seg einans um fasta sambandið, um Leirvíksfjørð. Ikki eitt einasti orð um hvussu man hugsaði sær at koma í gjøgnum Leirvík.

Tó so, løgmaður vissaðu okkum um at: Tað skal einki verða gjørt, sum er gott fyri Norðoyingum, um tað verður ringt fyri Lerivíkingar. Satt at siga so hava vit havt álit á orðum hansara.Fólkafundurin í Leirvík gjørdieisini greitt at: vit ynskja ikki alla ferðsluni millum Norðoyggjar og meginøkið gjøgnum Leirvík.

Milt sagt so kenna vit á okkum, at vit liggja millum hamara og ambolt, í hesum máli.

Øll útstýkking er steðgað eftir harraboðum úr Havn. Tær ungu barnaríku familjurnar sita nú í óvissu, tey hava bygt sær hús júst har tí har er friðaligt og gott at verða.

Landsverkfrøðingin sum er »myndaður av Øyvindur Brimnes«, eigur at koma við sítt tilmæli til Bjarni Djurholm vinnumálaráðharri viðvíkjandi vegføringin gjøgnum Lervík.

Er tað »nemt« hjá honum stakkalin, tá hugsað verðum um at hann eisini er umboðaður í P/F Norðoyatunnilin ?.Klæmint Weihi er helst ikki tann einasti, sum hevur ein habilitets trupulleika ! Ella?.

Í ár 2001 vóru 95.402 akfør flutt um Leirvíksfjørð.Ymisk til støddar, sjálvsagt, tó var stórur partur av hesum akførum tung akfør.Vit ynskja ikki at tit fara at veita hesa ferðslu gjøgnum bygdini.

Lati Norðoyingar fáa sítt fasta samband,tað gleðast vit eisini um, og ynskja teimum alt gott.

Men eitt eiga tit at minnast, tað eru orðini hjá løgmanni:Tað skal einki verða gjørt sum er gott fyri Norðoyingum, um tað verður ringt fyri Leirvíkingar.

# Dreymurin um Tekniska skúlan í Tórshavn

**Søgan um Janus, ein av yvir 500 Janusum í skúlaskipanini á Tekniska Skúlanum í Tórshavn**

**Jeffri Olsen**

Janus er handverkslærlingur, og lærutíðin er 4 ár, harav 50 vikur í skúla.

Byrjunarlønin er 32,62 kr. um tíman, skattskyldug sjálvandi.

Janus er nú í skúla. Hann er 18 ár, nýforelskaður og var leingi uppi seinastu nátt. Orkar ikki í skúla næsta dag. Men tá lønin kemur var hetta ein dýrur svøvnur 32,62 kr. um tíman (Tað kostar einki at vera 18 ár og nýforelskaður á øðrum skúlum.)

„Hvussu var skúlin ?“ spyr meistarin Janus, tá hann kemur aftur til arbeiðis.

„Fínur“, sigur Janus, í øllum førum, tá tað ikki regnaði, og vit sótu turr, og ongir kortslutningar vóru. Stólarnir vóru gamlir, onkur brotin, men vit sluppu sjálvir at sveisa teir aftur. Arbeiðseftirlitið grenjaði illa m.a. um ventilatión. Teir tvætla. Vit renna jú í øllum veðri millum 6 barakkir plus kantinuna, so frískari luft fáa vit nóg mikið av.

Janus grenjar ikki. Ger seg lidnan við læruna, arbeiðir síðan hjá sama meistara ella fer undir víðari útbúgving.

Ævintýrinum um nýggjan skúla flennir hann at. Hann hevði hoyrt somu søgu frá meistaranum, ið hevði hoyrt hana frá pápa sínum o.s.fr.

Fyri 22 árum síðani vórðu „barakkir“ uppsettar til T.S.T. Tær skuldu bert halda í 5 ár. Vit eru har enn.

Politikarar og skøkjur lova so nógv. Men munur er á. Og samgonguskjøl gera helst størstu nýttuna á WC-inum

Vinnuskúlar skulu mennast, verður sagt. Við at umvæla skúlan? kanska.

Vit hava øll brúk fyri Janusum. Teir byggja okkara hús, umvæla okkara bilar ella frystiskáp, klippa okkara hár, smíða okkara skip o.s.fr. Men Janusar tosa ikki so nógv, teirra motto hevur altíð veri, „Tosa minni og arbeið meira“. Betal tín skat, og rokna ikki við at handverkarar verða nakað virdir.

Janusar hava svartar hendur, tímdu ikki at ganga í skúla. Tað eru jú onnur klók fólk, sum lesa intellektuellar bøkur, tey hava brúk fyri góðum rammum, at arbeiða undir. Tey duga alt so væl.

Janusar arbeiða bara, reparera bara bilar, og byggja bara hús.

















































